# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt demokratiskt vónbrot

Forsetavalið í Iran gjørdist eitt vónbrot fyri tey mongu uttan fyri so væl sum innan fyri iransk landamørk, sum høvdu vónir um eina meira demokratiska tilgongd framyvir. Til valið stóð stríðið serstakliga millum tann víðgongda konservativa forsetan Ahmadinejad og tann meira hóvliga og broytingarsinnaða Mousavi. Viðhaldsfólk hjá hesum seinna eru vónbrotin og hava skipað fyri mótmælisfundum í Teheran, og alt hetta hevur elvt til størsta gøtuófrið í Iran í 30 ár.

Iran hevur eina sermerkta politiska skipan, har nógvir ymiskir stovnar býta valdið og stríðast um valdið. Politiska skipanin fevnir eitt nú um eitt fólkavalt løggávuting og ein fólkavaldan forseta, sum formliga hava ávikavist løggávuvald og útinnandi vald. Men herumframt er eitt átrúnaðarligt ikki fólkavalt eftirlitsráð, ið skal góðkenna eitt nú øll valevni og sum heild hevur vald til at tryggja, at allar lógir og politiskar avgerðir eru í samsvari við galdandi átrúnaðarligar meginreglur. Eisini kollveltingarhirðin hevur mikið vald. Dómstólarnir eru ikki óheftir av politiska valdinum soleiðis sum í einum vanligum vestligum fólkaræði og tað er so sum við rættartrygdini. Heildarmyndin er eitt prestastýri, sum gevur veljarafjøldini ávís formlig rættindi, løggavutingi og forseta eitt ávíst vald, samstundis sum hetta vald skal útinnast innan teir neyvu karmar, sum prestavaldið ásetir. Iran er sostatt í roynd og veru eitt islamiskt teokrati.

Ein fylgjan av harðrendu framferðini hjá iransku valdsharrunum úti so væl sum heima er, at Iran meira ella minni hevur verið avbyrgt síðan prestastýrið tók við valdinum fyri gott og væl trýati árum síðani. Kjarnorkupolitikkurin, antiísraelski og ágangandi uttanríkispolitikkurin hava elvt til sera vánalig viðurskifti við USA og við vestuheimin sum heild, og Iran eigur sín part av ábyrgdini av, at spenningurin í Miðeystri tykist økjast heldur enn at linka. Forsetin undan hesum, Khatemi, var hóvligur og broytingarhugaður og iranska samfelagið tók nøkur týðandi stig demokratiska vegin. Spenningurin minkaði, men alt hetta fór fyri skeyti, tá Ahmadinejad gjørdist forseti fyri fýra árum síðan. Nú bera eygleiðarar ótta fyri øktum spenningi í Miðeystri eins og ongar vónir eru fyri nakrari demokratisering av iranska samfelagnum. Kjarnorkupolitikkurin verður óbroyttur og hetta verður ein stóru trupulleiki hjá Obama forseta, sum varisliga hevur roynt at nærkast Iran til tess at minka um spenningin í Miðeystri og fáa betri viðurskifti millum Ísrael og tess grannar.

Samantikið er valúrslitið eitt stórt vónbrot ikki bert fyri hóvsomu og demokratisku kreftirnar í sjálvum Iran men so sanniliga eisini fyri USA og tess sameindu, sum hava sera stóran tørv á friði í Miðeystri, so stjórnirnar kunnu fáa høvi at savna seg um at loysa teir ovurstóru trupulleikar, sum eitt nú altjóða búskaparkreppan hevur borið við sær. Heimurin er ikki vorðin tryggari eftir forsetavalið í Iran, heldur er tað øvugt.

**Sosialurin**

## Útjavning ella Røktarheim – bæði sjálvandi



ASBJØRN DJURHUUS

**Viðmerking til grein hjá Heðin Mortensen »Røktarheim ella útjavning – ikki bæði«**

Loksins er ein arbeiðsbólkur settur at gera eina útjavningarskipan fyri kommunurnar í Føroyum. Sum skilst er hesin bólkur komin væl ávegis við einari kommunalari útjavningarskipan, sum á ein rættvísari hátt skal býta ríkidømi landsins.

Men sambært borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu skal hetta arbeiði nú steðgast, annars verður einki røktarheim bygt í Tórshavn. Pensjónisturin í høvuðsstaðnum er tikin gísil fyri at steðga arbeiðnum hjá bólkinum, ið skal koma við tilmæli um eina nýggja kommunala skipan.

Flestu kommunur í landinum hava seinastu árini bygt búpláss til eldri uttan størvegis hóvasták. Til dømis kann eg nevna mína egnu kommunu, sum í 2006 fíggjaði 22 milliónir kr. av nýggja røktarheiminum á Mørkini. Hetta var uml 50% av samlaðu álíkningini hjá kommununi. Lutfalsliga hevði hetta svarað til, at Tórshavnar kommuna lat 300 mlliónir kr. til røktarheimsbygging.

Í hesum døgum hevur Rósa Samuelsen eisini boðað frá, at stuðulin úr landskassanum verður hækkaður úr 500.000 kr upp í 700.000 fyri hvørt røktarheimspláss. Tórshavnar Kommuna fær sostatt betur fyritreytir at byggja røktarheim, enn aðrar kommunur hava havt. At tey eldru við tørvi á røktarbúplássum framvegis liggja óhjálpin í Tórshavnar kommunu kemst einans av skeivari politiskari raðfesting í kommununi.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu rópar neyðarróp, tí kommunan nú skal lata góðar 40 milliónir til kommunala útjavning. Hetta er ikki stórt meir enn árliga inntøkan hjá Tórshavnar havn. At brúka vánaligu støðuna á eldraøkinum í Tórshavnar kommunu sum undanførslu at steðga einari útjavningarskipan er ikki serliga virðiligt. Vælsignaði Heðin læt nú henda bólkin fáa arbeiðsfrið, og lat hann koma við sínum tilmælum.

Búskaparstøðan í landinum er sum heild ikki góð, og serliga meint raktar eru kommunur, hvørs inntøkur í stóran mun stava frá fiskivinnuni. Tí kenst tað hjá flestu kommunum troyttandi at hoyra hetti grenjið úr høvuðstaðnum, samstundis má tað eisini verða hugstoytt hjá teimum eldru í Tórshavn at kenna seg sum gíslar í hesum máli.

Nú er ikki stundin at grenja, trupla støðan í landinum krevur meira enn nakrantíð samhaldsfesti og brøðralag.

So Heðin, ikki javning ella røktarheim, men javning og røktarheim.

## Vit mugu ikki spara eftir reyv



LEVI MØRK

námsfrøðingur og býráðslimur hjá Tórshavnar kommunu

Nú sparingar eru í tí føroyska samfelagnum, fari eg at heita á landsins myndugleikar og politikarar hjá Tórshavnar kommunu um at vera ansin í hesum krepputíðum og ikki spara okkum eftir reyv við serligum atliti til barna- og ungdómsøki.

Vit síggja jú sparingar allastaðni, fíggjarligu útlitini og framskrivingar síggja ikki góð út við minni inntøkum og sparingum.

Vit hava longu fleiri dømir um hópuppsagnir og at stovnar hjá landinum og kommununar noyðast at spara.

Vit fara tíverri at síggja fleiri sum noyðast at rýma frá hús og heimi, orsakað av hesari fíggjarkreppu, serliga er tað barnafamiljur hetta gongur út yvir.

Eg fari tí serliga at heita á Tórshavnar kommunu um at fyribyrgja inna barna- og ungdómsøkið. Um ikki vit arbeiða skilagott, fer hetta at kosta meira fyri land og kommunur komandi árini.

Um vit skulu hyggja eftir her hjá okkum í Tórshavnar kommunu, so er alneyðugt, at vit finna verandi loysnir innan ungdómsøkið, og her eru nógvar góðar loysnir at finna, sum ikki kosta nógvar pengar, vit hava fleiri høli, sum vit kunnu leiga, bæði til ungdómshús og til frítíðarvirksemi. Tað er eisini møguleiki fyri at fíggja hetta við einum forsvarligum brúkaragjaldi og foreldragjaldi, sum vit kenna aðrastaðni frá.

Vit noyðast at viðurkenna, at eitt nú í Hoyvík eru nógvar barnafamiljur, sum hava sett búgv og her er stórur tørvur á einum ungdómshúsi. Í Hoyvík eru góð høli, sum kunnu brúkast til endamálið.

Bæði Frítíðarskúlin í Hoyvík og onnur hølir eru klokkuklár til endamálið. Hesar loysnir eru ikki dýrar fyri Tórshavnar kommunu, men ein verandi og fyribyrgjandi loysn fyri framtíðina. Hetta verður til stóra nyttu fyri okkara børn og ung. Eisini fer hetta at lætta nógv um hjá øllum barnafamiljum í Hoyvík.

Um vit ikki eru fyribyrgjandi á barna- og ungdómsøkinum. Eri eg stúrin fyri, at støðan hjá mongum verður sera ring, og tað verða tey sum eru ringast fyri, ið fíggjarkreppan fer at raka, og hetta fer at síggjast aftur hjá okkara børnum og ungum.

Vit mugu eisini hugsa um, at hetta er eisini galdandi fyri alla Tórshavnar kommunu, men mest fyri Hoyvík, Kollafjørð, Argir og Nólsoy.

Eitt gott dømi um fyribyrgjandi arbeiði hjá Tórshavnar kommunu er Margarinfabrikkin, her er gjørt eitt megnararbeiði seinastu árini fyri børn og ung, serliga hugsi eg um “Street Teams”, sum hevur verið við til at fyribyrgja og minka kriminalitetin í Havn.

**Vónandi stendur alt Tórshavnar býráð saman um at fyribyrgja á barna- og ungdómsøkinum í hesum krepputíðum.**

Tað er hendavegin vit skulu hugsa, tí børn og ung er okkara framtíð. Eg fari at gera mítt til at verja hetta øki og vóni, at allir býráðslimir hjá Tórshavnar kommunu hugsa á sama hátt, nú vit noyðast at spara á øllum økjum í okkara kommunu.

Ja, nú er tíð uppá, at vit vera umhugsin og ikki spara eftir reyv, men vera fyribyrgjandi á barna- og ungdómsøkinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.